

**Heðin Mortensen**
*Formaður*
*Kommunusamskipan Føroya*

# Kommunureformur ella bert kommunusamanlegging?

*Skal kommunala sjálvræðið bara syndrast, ella hava landsins kosnu yvirhøvur eina hugsan ella ætlan um, hvussu vit í framtíðini skulu skipa okkum fólkaræðisliga í hesum samfelag? Fyri okkum í Kommunusamskipan Føroya er hetta stóri spurningurin eftir Løgmansrøðuna 2010 og viðgerðina av henni síðan ólavsøku*

Tað var ein ikki sørt avgjørdur og sannførandi løgmaður, sum í hesi ólavsøkurøðuni proklameraði, at nú skuldi kommunali geirin reformerast.

Hin 1. januar 2013 skulu kommunurnar leggjast saman í 7 kommunalar eindir. Eldrarøktarøkið skal leggjast til kommunurnar at umsita samstundis og fólkaskúlin 1. august sama ár. Eisini segði hann, at kommunurnar skulu fíggja hesi málsøkini við at javnað verður í lutfallinum millum lands- og kommunuskatt, og at ein samhaldsføst útjavningarskipan skal setast í verk.

Í fyrstu syftu greiður boðskapur, sum gav ábending um eina heildarætlan, og at løgmaður hevði tryggjað sær politiska undirtøku fyri samlaða kommunureforminum – í øllum førum í samgonguni.

## Eingin heildarætlan og eingin semja

Men eftir orðaskiftið í tinginum og við at hyggja í løglistan til røðuna, so er hetta langt frá veruleikanum.

Í løglistanum er nevniliga bert eittans uppskot, ið beinleiðis hevur við sjálvan kommunureformin at gera, og tað er uppskot til løgtingslóg um kommunusamanlegging, hvørs endamál er (sitat): "at skipa landið í 7 kommunuøki" (sitat liðugt).

Tá lógin um kommunusamanlegging, ið skal hava gildi frá 1. januar 2013, partú skal í gjøgnum tingið á vári 2011, so varð væntandi, at hinar lógirnar, sum skulu leggja eldrarøktarøkið og fólkaskúlan til kommunurnar, eisini komu í tingið tá. Men har er einki at finna. Tó verður í røðuni boðað frá, at fólkaskúlareformurin skal samskipast við kommunureformin, tvs. kommunalu eindirnar, meðan eldrarøktarøkið kring landið nú skal skipast av nýggjum, har øll umsiting verður sentraliserað undir Nærverkinum.

Einki av hesum gevur tó nakra ábending um yvirskipaðaða ætlan um útlegging tíansheldur politiskum vilja til at styrkja kommunala fólkaræðið, kanska tvørturímóti.

Viðgerðin av ólavsøkurøðuni hevur eisini enn einaferð avdúkað, at í tinginum er als eingin semja ella heildarætlan um kommunureformin á hóma yvirhøvur, og tað tykist meira og meira greitt, at fleiri løgtingslimir síggja kommunureformin í sjálvum sær vera samanlegging av kommunum.

Veruligur vandi er tí fyri, at tann annars alneyðugi kommunureformurin verður reduseraður til, at nakrar strikur verða broyttar í kommunala landakortinum – og so einki meir. Her liggur tískil eingin ætlan ella nakað yvirskipað endamál við samanleggingunum annað enn samanlegging.

## Heildarætlan og semja neyðug – nú!

Hetta er beinleiðis í andsøgn við eina av høvuðsniðurstøðunum í Kommunuálitinum farna heyst. Nevndin metti, at tað tænti ikki nøkrum endamáli at leggja kommunur saman við lóg, um hetta ikki var partur av eini heildarætlan, har kommunurnar fingu fleiri uppgávur og ábyrgdir.

Um talan ikki varð um eina heildarætlan, so mælti nevndin staðiliga frá, at so týðandi inntriv vóru gjørd mótvegis kommunala fólkaræðinum.

Kommunusamskipan Føroya fer tí enn einaferð at heita á landsstýrið og løgtingið um at fylgja teirri reformtilgongd, sum øll kommunustýri í Kommunusamskipan Føroya komu ásamt um í Klaksvík 26. februar 2010, og sum var savnað í sokallaða Klaksvíksskjalið, serliga:

*"At løgtingið tekur eina prinsippiella politiska avgerð um høvuðstættirnar í umskipanini soleiðis, at landsstýrið og kommunurnar greitt vita*

- *hvørjar uppgávur skulu leggjast til kommunurnar,*
- *hvussu hesar skulu fíggjast, og*
- *hvussu kommunali bygnaðurin skal skipast.*

*Og ikki minst, at øll umskipanartilgongdin verður gjørd í neyvum samstarvi og samráðing millum land og kommunur. Kommunurnar skulu vera við í allari tilgongdini – ikki bert sum hoyringspartur, men sum politikkformulerandi, t.v.s. sita við borðið, har loysnirnar verða tilevnaðar og avgerðirnar verða tiknar.*

Eftir ólavsøkurøðuna sær Kommunsamskipan Føroya stóran vanda í, at hendan samgongan ella ein meiriluti í løgtinginum bert kann semjast um at leggja kommunurnar saman í størri eindir, og síðani hendir einki komandi nógvu árini.

Kommunusamskipan Føroya vil enn einaferð undirstrika, at samanleggingar av kommununum er ikki ein fyritreyt fyri øðrum reformum á kommunala økinum, og enn minni er samlegging av kommunum tað sama sum ein kommunureformur.

Samanlegging av kommunum í størri og burðardyggari eindir er hinvegin ein samanrunnin partur av einum samlaðum kommunureformi – eini heildarætlan fyri kommunala geiran í Føroyum og ábyrgd- og uppgávubýtinum millum land og kommunur.

Áðurnevnda kommunuálit er eitt gott grundarlag fyri politisku støðutakanini, sum hevur skund. Lat okkum nú landspolitikkarar og kommunupolitikkarar seta okkum saman og finna eina politiska semju um eina heildarætlan fyri kommunala geiran, øllum borgarum landsins at frama.

Hendan leist hevur Kommunusamskipan Føroya áhaldandi mælt til, og einki er at bíða við.

Fáa vit semju millum land og kommunur um eina heildarætlan – ein samlaða kommunureform, so ivist eg onga løtu í, at eitt samt løgting hevði tikið undir við ætlanini, og vit høvdu komið burturúr tí endamálsleysa kjakinum, vit hava verið vitni til í tinginum seinastu dagarnar.



**Hanus Samró**
*formaður HUXA*

# Verður stuðulsskipanin framvegis tann besta í 2011?

*Huxa er harðliga í móti, at Mentamálaráðið ger mismun á lesandi úti í heimi*

Útvarpið visti at siga í tíðindum í gjár, mikudagin 4. august, at lesandi uttan fyri Norðurlond eru tey einastu, ið kenna sviðan av neyðugu sparingunum. Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna við mentamálum, heldur fast við sparingarnar, tí alduringarnar ávirka bert teir óhepnu tretivu næmingarnar, ið leita sær útbúgving uttan fyri Norðurlond. Hon sigur enntá í lesarabrævi, at »stuðulsskipanin til føroyingar, sum lesa uttanlands er framvegis ein tann besta í øllum heiminum.«

Og tað er nakað, vit kunnu vera errin av.

Men sparingin er bert tann fyrsta av tveimum, sum Mentamálaráðið fremur í einari størri ætlan. Áður var hægsta stuðulsupphæddin 120.000 kr., men hon verður lækkað til 100.000 kr. í august í 2010, og so lækkar hon niður til 80.000 kr. í 2011.

## Útisetar

Orsøkirnar til neyðugu sparingarnar er tó ikki, sbrt lesarabrævinum hjá Helenu Dam á Neystabø, at mentamálaráðið skal spara pengar, men, og her siteri eg landsstýriskvinnuna við mentamálum, at: »yvir 60% av okkara ungdómi, sum lesur hægri lestur, fer uttanlands at útbúgva seg. Av hesum koma bert uml. helvtin heim aftur. Tað er trupulleikin.«

Men hvussu definerar Helena Dam á Neystabø »heim aftur«. Krevur hon, at øll lesandi skulu koma heim aftur beint eftir loknan lestur? Um hon ger tað, so fáa nýklaktu bachelor-vitini ikki neyðuga arbeiðsvitanina, sum er týdningarmikil í teirra arbeiðstilgongd. Um vit hugleiða víðari í fløktu definitiónini, meinar hon so við, at helvtin av teimum "60%" koma aftur eftir eitt, tvey ella fimm ár? Ella hvussu við tíggju? Er tað týdningarmikið fyri menningina av føroyska arbeiðsmarknaðinum, at lesandi »koma aftur« uttan arbeiðsroyndir?

## Ætlan

Hvussu breiðir og umfevnandi alduringarnir fara at verða í august mánað í 2011 er ógreitt. Men ikki er tað óhugsandi, at ringarnir fara at ávirka væl fleiri enn teir gott og væl tretivu lesandi, ið primert lesa í Amerika.

Tískil er spurningurin, um stuðulsskipanin framvegis verður ein tann besta í øllum heiminum í 2011?